## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði og landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið, partvís vátaslettingur. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Hann minkar vindin niður í lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 1 og 5 stig.

# Tryggingardepil

**Framyvir verður alt tryggingarvirksemi savnað heima við Kongbrúnna í Havn**

TRYGGINGARDEPIL
*Jákup Mørk*

At Tryggingarfelagið Føroyar heldur til niðri við Kongabrúnna er í sjálvum sær einki nýtt.

Í mong ár hevur felagið, sum áður var eitt samband, havt part av virksemi sínum á staðnum, og líkt er til, at virksemið felagsins í framtíðini verður enn meira miðsavnað á staðnum.

### Trygd kemur eisini

Einsamallir verða teir á Tryggingarfelagnum tó ikki.

Fyri stuttum frættist, at leigusáttmálin, sum Ferðaráðið hevði við Føroya-banka um leigu av gamla Sjóvinnubankanum, varð sagdur upp. Orsøkin var, at Føroya Banki hevði annað endamál at nýta bygningin til.

Jørn Astrup Hansen, stjóri í Føroya Banka, sigur við Sosialin, at orsøkin til, at Trygd nú flytir oman á Kongabrúnna fyrst og fremst er plásstrot.

– Verandi hølini hjá Trygd eru nú um at gerast heldru trong, og tí mettu vit, at tað varð neyðugt at flyta virksemi. Bankin átti framman undan hølini við Kongabrúnna, og vit sóu hesi hølini sum sera væl hóskandi.

– Tá bankarnir í sínari tíð vórðu lagdir saman, gjørdu vit av, ikki at selja Sjóvinnubankabygningin. Orsøkin var júst tann, at vit mettu, at vit kundu fáa tørv á hølunum í framtíðini.

Spurdur um tað ikki hevur nakað við plaseringina hjá kappingarneytunum at gera, svara bankastjórin, at tað hevur tað ikki.

– Vit hava valt hølini, tí vit halda tey vera hóskandi. Men tað ger nokk heldur ikki nakran skaða, at vit samstundis kunnu síggja, hvat gongur fyri seg hjá teimum, leggur hann smílandi afturat.

Hvussu er og ikki, so tykist tað í øllum førum, at tað framyvir skuldi verið tryggari hjá smábátaeigarunum at liggja við Kongabrúnna.




**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷9 |
| Nuuk | ÷3 |
| Qaqortoq | ÷5 |
| Ammassalik | ÷5 |
| Saint John's | - |
| Halifax | - |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 3 |
| Tromsø | 3 |
| Bergen | 8 |
| Oslo | - |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 3 |
| Moskva | 8 |
| Berlin | 8 |
| Warzawa | 8 |
| Kiev | 9 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 20 |
| Malorca | 12 |
| Athen | 19 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 26 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | - |
| New York | 8 |
| Miami | 21 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 28 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | - |
| Buenos Aires | 19 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 979 hPa. eystanfyri Ísland fer í útnyrðing, og lágtrýstið við Skotland fer norðureftir.




Lágtrýstið eystanfyri Ísland fer í landsynning og gevur høgætt her komandi dagarnar.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 15/11 kl. 06⁰⁰ - 16/11 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,1°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

### AVFALL




Avfallið: 3,0 mm - mált frá 15/11 kl. 06⁰⁰ - 16/11 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 69,2 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. nov. | 10:04 | 22:33 | 09:04 | 21:33 | 09:19 | 21:48 | – | 12:04 | 00:37 | 13:04 | 08:19 | 20:48 | 07:19 | 19:48 | 10:19 | 22:48 | 11:19 | 23:48 | 09:49 | 22:18 | 11:04 | 23:33 |
| 18. nov. | 11:06 | 23:41 | 10:06 | 22:41 | 10:21 | 22:56 | 00:33 | 13:06 | 01:33 | 14:06 | 09:21 | 21:56 | 08:21 | 20:56 | 11:21 | 23:56 | – | 12:21 | 10:51 | 23:26 | – | 12:06 |
| 19. nov. | – | 12:23 | 11:23 | – | 11:38 | – | 01:41 | 14:23 | 02:41 | 15:23 | 10:38 | 23:19 | 09:38 | 22:19 | – | 12:38 | 00:56 | 13:38 | – | 12:08 | 00:41 | 13:23 |
| 20. nov. | 01:04 | 13:46 | 00:04 | 12:46 | 00:19 | 13:01 | 03:04 | 15:46 | 04:04 | 16:46 | – | 12:01 | 11:01 | 23:41 | 01:19 | 14:01 | 02:19 | 15:01 | 00:49 | 13:31 | 02:04 | 14:46 |

11. nov.: Fullmáni
14. nov.: Mánin næstur jørðini
18. nov.: Seinna kvarter

Kelda. Skipalistin 2000

Original
bosal
Útstoyt



ES
p/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
FR-530 Fuglafjør›ur
Tlf. 444405
Fax444629

Dygdarmaskinur




*Bobcat gravmaskinur*
***- fáast í ymiskum sniðum.***

***Tú fært:***
- ***nógva útgerð***
- ***betri góðsku***
- ***størri motor***
- ***eina kraftigari maskinu***
- ***eina amerikanska maskinu við japanskum motori!***

***Mest selda maskinan í Danmark í 1999***

***Keyp góðsku - keyp Bobcat!***

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008